# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Røktarstarvsfólk

Á Psykiatriska deplinum verður søkt eftir røktarstarvsfólkum til hesi størv:

**Á D3** (opin deild) verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum ella pleygarum til 4 føst størv, 2 á brøki 0,5 og 2 á brøki 0,7 í skiftandi vaktum frá 1. januar 2009.

**Á D2** (afturlatin deild) verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi til farloyvisstarv á brøki 1,0 í skiftandi vaktum frá 1. desember 2008 til og við 31. desember 2009.

**Á D1** (5 dagadeild) verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum ella pleygarum í skiftandi vaktum til 1 fast starv á brøki 1,0 frá 1. desember 2008 og eitt farloyvisstarv á brøki 0,8 frá 1. desember 2008 til og við 31. desember 2009.

Psykiatriski depilin hevur visiónina at skapa "Samskipaða røkt og viðgerð", og arbeitt verður við at uppbyggja og innføra tvørgangandi toymisskipan, sum krevur at starvsfólkini kunnu innganga í pliktað samstarv í ymsum toymum.

Á seingjardeildunum er farið undir at arbeiða í kontakttoymum, og arbeitt verður áhaldandi við at dygdarmenna viðgerðina og umhvørvið á deildunum. Farið er undir at skipa tvørfakliga útbúgving í kognitivum viðgerðarhætt-um, og fleiri menningarátøk eru sett í verk, eins og nýggj viðgerðartilboð eru komin ella eru ávegis.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari
- hug at arbeiða við psykiatriskari sjúkrarøkt
- góð samstarvsevni
- evni at tillaga seg til broytingar
- helst royndir innan psykiatri

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og mennandi arbeiði
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv í og millum toymi
- arbeiði, har menning og trivnaður verður raðfest høgt
- góða innleiðslu

**Upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til:**
Katrin Toftegaard, virk. deildarleiðara á D3, lokal 4403, t-post: lskatto@ls.fo
Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, lokal 4402, t-post: lsbiran@ls.fo
Sunrid á Borg virk. deildarleiðara á D1, lokal 4401, t-post lssunbo@ls.fo
Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøð-ing, lokal 4102, t-post: lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. november 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina

Eitt fast starv á starvsbrøki 0,7 í skift-andi vaktum er leyst at søkja til setan 1. desember 2008 ella eftir avtalu.

Deildin er ein samansett eind við fýra ymiskum sergreinum. Endamálið við deildini er at veita viðgerð og røkt til barnakonur og nýfødd børn. Hetta verður gjørt í tøttum tvørfakligum samstarvi millum fakbólkarnar, sum eru tilknýttir deildini og heilsuskipanini annars.

Deildin er eitt spennandi og mennadi starvsstað, við nógvum framtíðar avbjóðingum. Tí søkja vit eftir sjúkra-røktarfrøðingi, sum hevur:

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- ynski um mennandi avbjóðingar
- ynski um ávirkan á fakligu menningina
- kreativitet og fleksibilitet

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Miu Pedersen, deildar-leiðara, tlf. 304599 lokal 5022 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkra-røktarfrøðing, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er 14. november 2008 kl.12.00**

## Bioanalytikarar

Á Rannsóknarstovuni er eitt fulltíðar-starv sum bioanalytikari leyst at søkja til setan 1. januar 2009.

Eisini eru 2 avloysarastørv leys at søkja til setan 1. januar 2009 til og við 30. november 2009 við møguleika fyri leingjan.

Rannsóknarstovan heldur til í nýggjum hølum og hevur góðar arbeiðsumstøð-ur.
Rannsóknarstovan er eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið eru umboðað, umframt ambulatorium á Landssjúkra-húsinum og á læknamiðstøðini í Runavík.

Í løtuni starvast uml. 25 bioanalytikarar, 2 skrivarar og 1 hjálparfólk. Allir bioanalytikararnir skifta millum tey ymsu serøkini.

Høvuðsarbeiðsøkið verður í byrjanini innan kliniska biokemi.

**Førleikakrøv**
- Bioanalytikaraútbúgving ella líknandi
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur

**Nærri fæst at vita** við at venda sær til leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen, tlf 304599, lokal 5601 ella teldupost: lsivyha@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 28. november 2008 kl. 12.00**

## Læknaskrivari til Psykiatriska depilin

Á Psykiatriska deplinum er eitt fulltíðar-starv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. desember 2008 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- hevur útbúgving sum læknaskrivari (ella aðra hóskandi útbúgving)
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- tænastuhugað/ur
- góð samstarvsevni
- góðan røkjuskap
- góðan KT-førleika
- blíð/ur og fyrikomandi
- tolir broytingar

**Vit kunnu bjóða:**
- fjølbroytt starv í lítlum skrivaratoymi
- góðar starvsfelagar og gott tvørfakligt samstarv í og millum toymi
- eitt gott og dynamiskt arbeiðsumhvørvi, har nógvar avbjóðingar standa fyri framman
- møguleikar fyri førleikamenning og dygdarmenning

**Nærri fæst at vita** um starvið frá Tormóði Stórá, leiðandi yvirlækna, tlf. 304500, lokal 4100, t-post: lstost@ls.fo ella til Jórun Arge, leiðsluskrivara, lokal 4103, t-post: lsjorar@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. november 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Deildarleiðari til B8**
Umsóknarfreistin er 3. november 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 3. november 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G1** (endurlýsing)
Umsóknarfreistin er 7. november 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo